# Góða SøluRás 2003

Eins og undanfarin ár er sølustevnan SøluRásin 2002 fyriskipað av Ítróttarfeløgunum á Skála og á Strondum. Tað vil siga, at Skála ítróttarfelag, Skála Róðrarfelag, Stranda Ítróttarfelag og Ungmannafelagið Strálan standa saman um at skipa fyri stevnuni.

Endamálið við stevnuni er at fáa pening til vega, sum skal nýtast til raksturin hjá hesum fýra feløgunum.

SøluRásirnar, sum hava verið seinastu árini, hava verið serstakliga væl eydnaðar. Fleiri enn 30 fyritøkur hava sýnt fram og tey bæði seinastu árini vóru fleiri enn trý túsund atgongumerki seld.

Tí hava vit aftur í ár gjørt okkara ítarsta fyri at øll - bæði framsýnarar og gestir - skulu vera so væl nøgd við stevnuna sum tilber.

Vit fara her at takka øllum framsýnarum, lýsarum, teimum sum undirhalda, teimum vitjandi og øllum tykkum mongu, sum hava hjálpt til at gera tað møguligt at hava eina stevnu sum hesa.

Við ynskjum um eina væl vitjaða og góða sølustevnu á SøluRásini 2002. Vælkomin!

**Fyrireikingarbólkurin**



## Skála Ítróttarfelag

Skála Ítróttarfelag, sum varð stovnað í 1965, er í dag eitt fótbóltsfelag burturav. Felagið er umboðað í øllum yngru deildunum. Harumframt hevur felagið eisini lið í 1. og 3. deild hjá monnum.

Formaður er Hans J. Andreasen.



## Stranda Ítróttarfelag

StÍF, sum felagið eitur í dagligari talu, varð stovnað í 1942 og man tí vera eitt av teimum elstu feløgunum í landinum.
Felagið er hondbóltsfelag burturav, og hevur lið í øllum deildunum, bæði hjá kvinnum, monnum, gentum og dreingjum.

Formaður er Andras Danielsen.



## Skála Róðrarfelag

Skála Róðrarfelag varð stovnað í 1993 og er róðrarfelag burturav. Felagið hevur luttikið í kappróðri við tveimum bátum síðani stovnanina. 5-mannafarinum Svani og 10-mannafarinum Skálabátinum.

Formaður er Dan Petersen.



## Strálan

Ungmannafelagið Strálan varð stovnað í 1989. Felagið hevur tikið lut í kappróðri við 6-mannafarinum Stráluni síðani 1991. Felagið fær nýggjan bát til komandi kappróðrarár. Umframt róðurin hevur felagið eisini badminton á skránni

Formaður er Anfinn Gærdum.




Vit eru at hitta á bási nr. 3



Preeti Payal
900 Vágur

Sosialurin 541800





SHARI
STEVNUTILBOÐ

Velour joggingsett ymiskir litir
Jakki vanl. pr. 245,00 kr.
Buksur vanl. pr. 199,00 kr.

Nú fyri settið 250,00 kr

Annars nógv onnur góð tilboð





Vit klæða bæði ungu og gomlu kvinnuna

SHARI

Sosialurin 541800



Nýggja kókibókin




Verður við á sølustevnuni á Skála sunnudagin 9. november

Jóhanna á Tjaldrafløtti & Elisabeth Akursmørk signera bókina á bási nr. 9 hjá K.B.I



TELDUTILBOÐ!

Royn teldurnar á SøluRásini 2003 í høllini á Skála 8. og 9. november




QULCOM Compact i

**Compact *I*** er sera væl egna til alt vanligt heimabrúk, sum til dømis internet, tekstviðgerð, bókhald, DVD filmar og spøl.

**Intel Celeron 2.0 GHz CPU - 40 GB 7200 rpm Harðdiskur - 256 MB DDR RAM
Onboard 32 MB Grafikkur - Sound Blaster Ljóð - 16x DVD Støð - 4x USB 2.0
Modem - Netkort - Multimedia knappaborð - Mús við scroll - 160W Hátalarar
17" Skermur - Windows XP Home - DVD Software - 2 ára garanti**

Einans 6.900,- Við levering!

QULCOM Compact E

Við heilt serligari ljóð- og mynagóðsku er **Compact *E*** serliga væl egna til spøl og DVD filmar. Teldan kann sjálvandi eisini brúkast til alt vanligt arbeiði.

**Intel Pentium 4 2.67 GHz CPU - 80 GB 7200 rpm Harðdiskur - 512 MB DDR RAM
Geforce 5 FX5200 128 MB Grafikkur - Sound Blaster Ljóð - 16x DVD Støð
48/24/48x CDRW Brennari (combo) - 4x USB 2.0 - Modem - Netkort
Multimedia knappaborð - Mús við scroll - 380W Hátalarasett v/ Subwoofer
17" Skermur - Windows XP Home - DVD Software - 2 ára garanti**

Einans 9.900,- Við levering!

Keyp beinleiðis á **www.nyzac.fo**, ella ring á **45 20 90**
Minst til! Tú fært altíð besta teldutilboðið frá **NYZAC**

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum. Tilboðini eru fyribils galdandi so leingi varan er á goymslu.